Løgmaður um Høgna Hoydal:

# Forkemur sjálvstýristilgongdini

**– Við at melda sovorðið út til heimspressuna, so forkemur Høgni Hoydal møguleikunum fyri avtalaðu fullveldistilgongdini, sigur Anfinn Kallsberg, nú Høgni Hoydal hevur úttalað seg til útlendskar fjølmiðlar um, at komandi løgtingsval verður at meta sum ein fólkaatkvøða um fullveldi innan fýra ár**



*Løgmaður kennir seg ørkymlaðan, nú Høgni Hoydal aftur hevur úttalað seg um sjálvstýristilgongdina á ein hátt, ið ikki hóvar løgmanni.*

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Nú er eftir øllum at døma aftur komið vátt í reiðrið millum stóru samgonguflokkarnar. Høgni Hoydal hevur fyri altjóða fjølmiðlum boðað frá, eins og hann fleiri ferðir hevur sagt við føroyskar fjølmiðlar, at komandi løgtingsval verður eitt val um fullveldi, har tað verður undirstrikað, at Føroyar mest sannlíkt hava tikið fullveldi um fýra ár, um verandi samgongu sleppur at halda fram.

– Tað er ógvuliga ørkymlandi, at Høgni Hoydal kemur við tílíkum útsagnum til fjølmiðlarnar. Høgni Hoydal er vælkomin at hava sínar meiningar, men hann má minnast til tað fullveldistilgongdina, ið samgongan longu hevur avtalað, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður heldur, at útsagnirnar frá varaløgmanni til altjóða fjølmiðlar í Keypmannahavn mánadagin eru valupplegg hjá Tjóðveldisflokkinum, men hann harmast almikið um hetta, tá Høgni Hoydal er uttanlands sum umboð fyri landsstýrið.

– Við at melda sovorðið út til heimspressuna, so forkemur Høgni Hoydal møguleikunum hjá avtalaðu sjálvstýristilgongdini, tá hetta bæði sendir skeiv signal út til danskar politikarar, og Fólkaflokkurin vil ongantíð ganga við til fullveldi innan fýra ár, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður heldur onga orsøk vera til at skriva út nýval av hesi orsøk, tá so stutt er eftir til løgtingsvalið, men hann ásannar, at stevið innanhýsis í samgonguni ikki er av tí besta, nú landsstýrismenn tvær reisir hava úttalað seg beint ímóti gjørdum avtalum og hugsanunum hjá løgmanni. Áður vóru Karsten Hansen og Høgni Hoydal, sum hvør í sínum lagi úttalaðu seg um fullveldistilgongdina á ein hátt, sum ikki hóvaði løgmanni, Anfinn Kallsberg.

- So leingi Fólkaflokkurin hevur tað mandat, hann hevur, vilja vit arbeiða fyri einari tryggari tilgongd, og tað er altavgerandi fyri okkum. Tað kemur als ikki upp á tal, at vit fara at taka fult sjálvstýri innan fýra ár, sigur Anfinn Kallsberg.

Spurdur um hann væntar, at hetta fær ávirkan á komandi samgongumøguleikar eftir løgtingsvalið, sigur løgmaður, at Fólkaflokkurin ætlar at halda áfram við sínum politikki.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa hendur á Høgni Hoydal til eina viðmerking.

## Friðarligt vikuskiftið

**Klaksvík:** Vakthavandi á politistøðini sigur, at hóast rættiligt illveður hevur verið í vikuskiftinum, so eru ikki nógvir skaðar fráboðaðir. Ein el-linja slitnaði á Nýggjavegi við Tekniska Skúla um hálvgum tvey tíðina náttina til leygardagin. SEV kom á staðið og tók sær av tí, áðrenn nakar størri skaði stóðst av hesum. Ein skorssteinur fór av einum sethúsum á Viðareiði leygardagin. Annars er ongin annar skaði fráboðaður.

Um tað keðiliga veðrið eisini hevur havt sína ávirkan á náttarlívið, skal verða ósagt, men tað hevur í øllum førum verið sera friðarligt í vikuskiftinum.

Anders Fogh Rasmussen:

# Heldur seg til gjørdar avtalur

**Anders Fogh Rasmussen leggur seg ikki út í føroysk viðurskifti, og hann heldur seg til gjørdar avtalur, og útsagnirnar hjá Høgni Hoydal ávirka ikki danska forsætisráðharrin nakað**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*Magnus Dam*



*Anders Fogh Rasmussen heldur somu linju í sínum føroyapoltikki sum áður.*

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, heldur seg til gjørdar avtalur við løgmann og landsstýrið, og útsagnirnar frá Høgna Hoydal fáa ongar ávirkan á politikkin hjá Fogh yvirfyri føroyingum.

-Føroyingar gera av, hvussu teir leggja sítt arbeiði heima í Føroyum til rættis, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Og almenni politikkurin hjá landsstýrinum sigur einki um fýra ár. Hann arbeiðir ikki við nakrari ítøkiligari tíðarætlan.

Landsstýrið og stjórnin eru samd um, at føroyingar kunnu yvirtaka málsøki, so størri ábyrgd fer at liggja hjá føroyskum myndugleikum. Og sama semja sigur, at tá ið málsøki verða yvirtikin, so minkar blokkstuðulin samsvarandi kostnaðinum á yvirtiknu málsøkjunum. Hetta er tað, sum Fogh heldur seg til, varð gjørt greitt á tíðindafundi týsmorgunin.

Anders Fogh Rasmussen gjørdi harafturat fullkomiliga greitt, at hann ikki leggur seg út í, hvat føroyskir myndugleikar gera við blokkstuðulin. Føroyingar skulu eisini vænta sær blokkstuðul á sama hátt sum donsku kommununar, og eins og tær, leggur stjórnin seg ikki út í, hvat peningurin verður nýttur til.

Anders Fogh Rasmussen hevur annars júst fingið nóg mikið av politiskum stuðli, soleiðis at fíggjarlógin at viðtakast í Fólkatinginum.



# Búfólkið skal kenna seg sum heima



*Heilar 20 umsóknir vóru til tey 10 plássini á nýggja Bústovninum og Sambýlinum á Mýrivegi í Klaksvík*

MENNINGARTARNAÐ
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Ì gjár kundi fyrsta búfólkið flyta inn í nýggja bústovnin og sambýlið fyri menningartarnað og fólk við autistiskum breki í Klaksvík.

Hesin stovnur er úrslitið av einum arbeiði, ið hevur verið í gongd líka síðani á heysti í 1997.

### Stovnurin býttur í tvey

Stovnurin er í tveimum, har tann eini parturin er eitt sambýlið, sum kemur at húsa seks menningartarnaðum. Hin parturin er ein bústovnur við pláss fyri fýra børnum og ungum, sum bera brekið autismu.

Munurin á sambýlinum og bústovninum er, at tey menningartarnaðu í sambýlinum í ein vissan mun eru før fyri at klára seg sjálvi, eins væl og tey eisini sjálvi skulu gjalda húsaleiguna. Hinuvegin kemur landið at gjalda uppihaldið hjá teimum, ið skulu búgva á bústovninum.

Øll búfólkini fáa eina íbúð hvør, sum tey so sjálvi koma at innrætta eftir egnum ynski.

Ì hesi íbúð er køkur, baðirúm og stova og kamar í einum.

### Einasti stovnur við íbúðum

Hetta er einasti stovnur í landinum, ið kann bjóða búfólkinum eina heila íbúð at húsast í.

Allar íbúðirnar eru eins bygdar, men tó eru tað einans íbúðirnar í sambýlinum ið hava ... búfólkini við autistiskum breki sum oftast ikki eru eins væl fyri og tey menningartarnaðu.

– Vit valdu at gera íbúðir heldur enn kømur til búfólkini. Tað fer vónandi at fáa tey at kenna hetta meira sum teirra egna heim. Nú hava tey jú møguleika at bjóða fólki inn til sín sjálvs, heldur enn inn í eina felags stovu, har onnur fólk eisini eru samstundis, sigur Jóhanna Hansen, leiðari á báðum stovnunum.

### Búfólkini sjálvi ávirka gerandisdagin

Búfólkini í sambýlinum skulu sjálvi, saman við starvsfólkunum, avgera hvussu teirra gerandisdagur kemur at síggja út. Hetta verður gjørt við regluligum húsafundum, har tey menningartarnaðu sleppa framat við teirra uppskotum um, hvat skal fara fram á stovninum.

À bústovninum fyri børn og ung við autistiskum breki verða tað tó í størri mun starvsfólkini, ið koma at skipa fyri einum regluligum gerandisdegi. Her verður tikið útgangsstøðið í tí einstaka búfólkinum, og er endamálið at nøkta tørvin hjá teim fýra fastbúgvandi.

Tilsamans 15 starvsfólk koma at verða á stovnunum, harav tvey hjálparfólk og 13 pedagogar.

### Byrja so smátt at flyta inn

Ì gjár kundu búfólkini so spakuliga byrja at flyta inn í teirra egnu íbúð. Men enn er nógv, ið skal fáast upp á ... at hanga, køksting skulu inn í køkin og so víðari. Júst, sum vit sjálvi kenna tað, tá vit skulu flyta inn í okkara egna.

Hetta tekur alt tíð, men á Bústovninum og Sambýlinum við Mýrivegin í Klaksvík vænta tey, at tey 10 búfólkini øll skuldu verið komin uppá pláss seinast í hesum mánaðinum.

### Stórt framstig fyri tey menningartarnaðu

Ì fleiri ár hava tey menningartarnaðu í Klaksvík ikki havt aðrar bústaðarmøguleikar enn umlættingarheimið Dáin, sum varð tikið í nýtslu í 1989.

Ì byrjanini hevði Dáin fimm pláss, men var hetta alt ov lítið til at kunna nøkta tørvin hjá teim menningartarnaðu í Norðoyggjum.

Tí setti Dáin eisini eina dagumlætting á stovn, sum børn við ymiskum tørvi kundu gera nýtslu av, samstundis sum ein drongur við autistiskum breki eisini búði fast á staðnum. Men enn var hetta alt ov lítið.

À heysti í 1997 var tískil fundur hildin í Klaksvíkar Kommunu, har umboð fyri Almannastovuna, Serstovnadeildina, Javna, Dáan og ein arbeiðsbólkur luttóku.

Hesin arbeiðsbólkur var fyrr í 1997 settur við tí endamáli at kanna, um ikki ein bústovnur ella eitt sambýli kundi setast á stovn í Klaksvík.

À hesum fundi kom eisini fram, at tørvur var á fleiri bústovnum í Klaksvík, og varð heitt á kommununa um at gera nakað ítøkiligt við hetta mál.

... tektar, og setti táverandi landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálum eina bygginevnd at koma við einum uppskoti og eini kostnaðarmeting. Eftirfylgjandi landsstýrismenn hava hildið áfram við hesum arbeiði, og týsdagin í seinastu viku kundi bygginevndin handa Sámal Petur í Grund, núverandi landsstýrismanni í Almanna- og Heilsumálum, sjálvan stovnin.

Móttøka var hildin í hesum sambandi, og var heilt fitt av fólki møtt upp til sjálva handanina.

## Framvegis onki ungdómshús í Klaksvík



**Gongd er í málinum um ungdómshúsið í Klaksvík, men tað skal ein býráðssamtykt til, áðrenn nakað ítøkiligt, so sum at seta ein leiðara, verður gjørt, sigur Jórun Høgnesen, forkvinna í mentanarnevndini.**

UNGDÓMUR
*Solby A.Eliasen*

Hóast man ikki hevur hoyrt so nógv til ætlanina um ungdómshúsið í Klaksvík í eina tíð, so er málið ikki lagt til síðis. Annars hevur verið at hoyrt, at húsið skuldi verða klárt til nýggjárs. Men framvegis er onki ítøkiligt stig tikið til at finna eitt høli til tey ungu. Endamálið við hesum húsi er, at geva ungum og børnum eitt stað at halda til í og hugna sær.

### Skal ikki kallast eitt ungdómshús

Tey vilja illa kalla tað eitt ungdómshús kortini, tí ætlanin er, at tað skal verða eitt stað fyri børn eisini. Harvið kunnu børnini longu frá ungum árum venja seg við umhvørvið og síggja staðið sum teirra egna. Húsið skal ikki nýtast til dans, men onnur tiltøk, sum tey ungu kunnu vera við til at avgera.

– Vit vilja venda rákinum, sum ger, at fólk siga, at tað hendir onki í Klaksvík, sigur Jórun Høgnesen. Hon vísir á, at tað verður arbeitt av allari orku við málinum. Men sum er, er onki høli til taks til ungdómin – hvørki til dans ella nakað annað, og so mugu vit ásanna at langt er eftir á mál.